## Viðgerð í trimum

Tí skizofrena verða vanliga bodnir tríggir viðgerðarhættir: Heilivágur, sum blokkera virkningin av signalevninum Dopamin í heilanum. Samrøðuterapi, har ein roynir at økja sjálvskensluna, sjálvsfatanina, symptomini, økja um virksemið og at minka um kensluna av tómleika. Sosial tiltøk, har ein fær sett á stovn verustøð, møguleikar fyri undirvísing og ítrivum og egnaðu bústaðarmøguleikum.

## Ógvuslig sálarsjúka

Millum tær ógvusligastu sálarsjúkurnar er skizofreni. Hetta er ein sjúka í heilanum sum hevur broytingar í hugsan og atburði við sær. Hin sjúki verður ikki førur fyri at skilja millum veruleika og egnar ímyndir. Sjúkan rakar bæði kynini eins ofta og byrjar vanliga í 15 til 30 ára aldurin. Møguleikin at gerast skizofrenur er umleið 1 prosent av fólkatalinum.





*- Tað er so gott at síggja, at hann sjálvur skapar sær nøkur ting. Hann tekur sær eisini væl av teimum sum hann býr saman við og hjálpir teimum við ymiskum, vísir systurin á*

Eitt av hesum er øll tann stóra nøgdin av heilivági, sum tey eru noydd at taka hvønn einasta dag, og hvussu hetta broytir ein persón likamliga.

- Eg havi onkutíð hildið meg sæð beiggja mín á vegnum, og havi skulað rópt á hann, men so hevur tað víst seg at verið onkur heilt annar, heldur Bára fyri.

Fyri hana er ræðandi at síggja, hvussu rørslur, kropsbygnaður og annað hjá fleiri av teimum sálarsjúku minna um hvørt annað. Eftir hennara sannføring ger heilivágurin sítt til at tey sálarsjúku verða einsrættað.

- Tað er ómetaliga trupult at gerast sjúkur í eini sjúkari skipan, sigur Bára. 80 prosent av viðgerðini er umvegis heilivágin. Hetta er sum eitt val millum pest og kolera.

- Heilivágurin ger, at hann bólgnar upp. Hann verður snøgt sagt doyvdur, og hetta hevur stór kropslig árin sum síggjast væl!

Hon er vitandi um, at beiggja hennara ikki dámar at síggja út soleiðis sum hann ger nú. Men hann kann heldur ikki vera heilivágin fyriuttan.

- Beiggi er ikki býttur. Tvørturímóti. Men hann er sálarsjúkur, sigur hon.

*Eg havi onkutíð hildið meg sæð beiggja mín á vegnum, og havi skulað rópt á hann, men so hevur tað víst seg at verið onkur heilt annar*



*Mamman greiðir frá, hvussu trupult tað er at vita, at sonurin er so einsamallur. Eisini setir hann sjálvur spurnartekin við framtíðina, og um hann nakrantíð fer at hava nakra at vera góður við og kunna liva saman við*

## Hvat skal man siga?

Tá sonurin gjørdist sálarsjúkur merkti tað, at hann eisini hevur mist nógv av sínum fyrra lívi.

Tað hevur verið trupult hjá honum at varðveita sambandið við vinirnar, og gerandisdagurin hjá honum sjálvum var vendur upp og niður.

Sjúka hansara er álvarslig, og hevur hann tí havt tørv á sterkum heilivági. Hetta hevur eisini merkt, at hann ikki hevur klárað at búð fyri seg sjálvan ella at hava nakað arbeiði.

- Hann er sera einsamallur, hóast hann er saman við fólki alla tíðina, greiðir mamman frá.

Hon sigur, hvussu trupult tað er at vita, at sonurin er so einsamallur. Eisini setir hann sjálvur spurnartekin við framtíðina, og um hann nakrantíð fer at hava nakra at vera góður við og kunna liva saman við.

Bára sigur, at tað er eisini trupult tá ið fólk, sum kendu hann áðrenn hann gjørdist sjúkur, hitta beiggjan.

- Samrøðan fer ongatíð víðari enn til tað, at beiggi greiðir frá, at hann er sálarsjúkur. Kenningarnir spyrja einki meiri, tí tey helst ikki vita, hvat tey skulu spyrja um, sigur hon.

## Vón fyri framman

Hóast sonurin og beiggin livir í djúpum einsemi, er hann ikki for nothing.

Hann hevur megnað at uppbyggja sær sítt egna lív út frá hansara fortreytum. Hann hevur sjálvur leitað sær upp arbeiði, og hevur eisini fingið okkurt at hava ábyrgd av, og sum hann megnar til fulnar.

Tað er so gott at síggja, at hann sjálvur skapar sær nøkur ting. Hann tekur sær eisini væl av teimum sum hann býr saman við og hjálpir teimum við ymiskum, vísir Bára á.

Bæði mamman og dótturin eru samdar um, at hann er væl fyri og blómar á sín egna hátt. Sjálvar hava tær ikki mist vónina um, at sonurin og beiggin ein dag kann fáa ein góðan bústað, starv og eitt gott og innihaldsríkt lív.

- Tað hevur ein stór framgongd seinastu árini, og tað er munur á, at hann er nógv betur fyri nú.

- Framgongdin hendir spakuliga. Hóast tað eru onkur afturstig, so gongur rætta vegin!

*Hann er sera einsamallur, hóast hann er saman við fólki alla tíðina*